# Gerðabók býráðsins

| | |
|---|---|
| Fundardagur: | 14. desember 2006 |
| Býráðsfundur nr. | 16/2006 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2006 tann 14. desember kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinumi, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 08. desember 2006 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Petur Abrahamsen
Jón Nolsøe Olsen hevur boðað býráðsskrivstovuni frá kl. 15.30, at ikki liggur fyri hjá honum at møta til fundar.

***Skrivari:*** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 69/2006.**

**Viðvíkjandi eykajáttan til økið í smábátahavnini konto 222049 og planering við Ísvirkið konto 222083.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá kommunalu umsitingini, dagfest 21. november 2006, hvar greitt verður frá, at neyðugt at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan í sambandi við at dýpa innsiglingina í bátahavnini konto 222049 og til planering uttan fyri Ísvirkið konto 222083, grundað á at arbeiðini mugu verða gjørd inniverandi fíggjarár.

Avsettar eru kr. 400.000,00 til hesi arbeiði og verður roknað við at nýta kr. 300.000,00 aftrat í ár.

Skotið verður upp, at fíggingin verður útvegað av konto 860006 "Partafelagsskattur". Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2006 varð partafelagsskatturin mettur til kr. 1,7 mió, men sambært uppgerð frá Toll- og skatt fyri inntøkuárið 2005 vísir seg, at hesin er kr. 3,5 mió. Soleiðis er tøkur peningur á hesi konto til endamálið.

Talan er í hesum føri um at veita eina eykajáttan upp á kr. 300.000,00 til íløgur á øki 2 "Kommunal virkir", og at fíggja hesa av meirinntøku av partafelagsskatti, sum verður goldin kommununi seinast í hesum ári og fyrst í komandi.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 23. november 2006 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 300.000,00 til omanfyri nevndu endamál, og at henda verður fíggjað av meirinntøku av partafelagsskatti konto 860006.

Býráðið hevur havt 1 viðgerð av eykajáttanini til viðgerðar á fundi tann 29. november 2006 og varð einmælt samtykt at beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 14. desember 2006.

**Avgerð:**

Eykajáttanin varð samtykt við 2. viðgerð. (7-1. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

**<u>Mál nr. 70/2006</u>**

**Viðvíkjandi eykajáttan til liðuggerð av dagstovninum og økinum uttanum konto 502305.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá kommunalu umsitingini, dagfest 21. november 2006, hvar greitt verður frá, at neyðugt at veita eina eykajáttan í sambandi við at gera kjallaran á dagstovninum og uttanumøkið liðugt, og at neyðugt er at heitab á býráðið um eina eykajáttan til endamálið.

Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2006 eru avsettar kr. 1,170 mió til arbeiðið, men roknað verður við at nýta kr. 1,140 mió aftrat til liðuggerð av at innrætta kjallaran, til uttanumøkið og til keyp av innbúgvi, leikum vm.

Grundin fyri, at arbeiðið er vorðið so nógv dýrari enn roknað varð við, kemur í høvuðsheitunum av, at uttanumøkið varð nógv meira umfatandi enn upprunaliga ætlað.

Í 2005 vórðu avsettar kr. 500.000,00 til at innrætta kjallaran, so pláss vórðu fyri 16 børnum aftrat á dagstovninum, men arbeiðið fór veruliga ikki í gongd fyrr enn í 2006, soleiðis at nýttar vórðu umleið kr. 160.000,00 til arbeiðið í 2005. Munurin kr. 340.000,00 er tí at rokna sum ein framflyting frá 2005 til 2006.

Skotið verður upp, at fíggingin verður útvegað av konto 860006 "Partafelagsskattur". Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2006 varð partafelagsskatturin mettur til kr. 1,7 mió, men sambært uppgerð frá Toll- og skatt fyri inntøkuárið 2005 vísir seg, at hesin er kr. 3,5 mió. Soleiðis er tøkur peningur á hesi konto til endamálið.

Talan er í hesum føri um at veita eina eykajáttan upp á kr. 1,140 mió til íløgur á øki 5 "Almanna- og heilsumál", og at fíggja hesa av meirinntøku av partafelagsskatti, sum verður goldin kommununi seinast í hesum ári og fyrst í komandi.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 23. november 2006 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 1,140 mió til omanfyri nevndu endamál, og at henda verður fíggjað av meirinntøku av partafelagsskatti konto 860006.

B´´yráðið hevur havt 1. viðgerð av eykajáttanini til viðgerðar á fundi tann 29. november 2006 og varð einmælt samtykt at beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 14. desember 2006.

**Avgerð:**

Eykajáttanin varð samtykt við 2. viðgerð. (7-1. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

**<u>Mál nr. 71/2006.</u>**

**Mál um broytan av byggisamtyktini við Bakkageilina.**

Fyri at fáa sum mest gagn av útstykkingini, sum nú verður gjørd í og suður frá Bakkageilini mælir tekniska nevndini býráðnum til á fundi tann 08. desember 2006, at tann parturin av verandi frílendi "L", sum er skraveraður við reyðum á hjáløgdu tekning verður broyttur til sethús7bústaðarøki "Økið B".

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (8-0).

**<u>Mál nr. 72/2006.</u>**

**Umsókn frá Jóan Peturi Berg um byggiloyvi til uppíbygging til sethús síni.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Jóan Peturi Berg, dagfest 08. desember 2006 um byggiloyvi til uppíbygging av duri aftrat sethúsum sínum á matr. nr. 189 í Fuglafirði.

Umsóknin hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 08. desember 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bygging sambært hjálagdari tekning.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (8-0).

**<u>Mál nr. 73/2006.</u>**

**Viðvíkjandi Minnisvarðanevndini.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Minnisvarðanevndini, dagfest 28. juni 2006, har nevndin boðar kommununi frá, at nevndin á fundi tann 28. juni 2006 hevur samtykt at boða frá, at nevndin frá 15. juli 2006 at rokna ynskir at fara frá, og vil mæla til, at mentamálanevndin yvirtekur arbeiðið.

Nevndin takkar í skrivinum kommununi fyri tað álit, ið hn lat nevndini upp í hendi hesi árini.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt skrivið á fundi tann 05. september 2006, og mælir býráðnum til at ganga áheitanini frá Minnisvarðanevndini á møti, soleiðis at tað arbeiðið, sum Minnisvarðanevndin hevur tikið sær av framyvir verður gjørt av mentamálanevndini.

Talan er eitt um eitt nú hesi arbeiði:

- Halda verandi plátur yvir sjólætin í góðum standi.
- Fáa til vega nýggjar plátur, tá persónar eru sjólætnir.
- Skipa fyri minningarhaldi við minnisvarðan allahalganardagar.

Annars ber kommunan allar útreiðslur av at halda minnisvarðaøkið viðlíka, viðlíkahalda pláturnar og fáa nýggjar til vega, somuleiðis sum kommunan eisini rindar lýsingar í samband við minningarhald, kransar vm.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 28. september 2006 og varð samtykt varð at beina málið aftur í mentamálanevndini til viðgerðar, tá ið býráðið varð av teirri sannføring ikki at avtaka nevndina, men at velja 3 nýggjar limir í nevndina. Mentamálanevndin verður at koma við uppskoti um limir til komandi býráðsfund 26. oktober 2006. (9-0).

Á fundinum upplýsti nevndarformaðurin, at hann hevði tosað við Páll á lakjuni um at taka sær av minningarhaldinum við minnisvarðan allahanganardag 2006, og hevði hann játta hesum. Formaðurin kom annars at taka sær av tí praktiska í sambandi við sjálvt haldið, og skuldi umsitingin avrita sangir vm.

Hann upplýsti eisini, at hann hevði verið í sambandi við persónar, um teir høvdu áhuga í at verða valdir í eina nýggja minnisvarðanevnd, men allir teir spurdu søgdu seg ikki hava tíð og umstøður.

Á fundi í mentamálanevndini tann 12. oktober 2006 varð samtykt at útseta endaligu viðgerðina til seinni fund, tá nevndin varð komin fram á limir, sum vildu átaka sær arbeiði í minnisvarðanevndini.

Nevndin hevur aftur viðgjørt málið á fundi tann 20. november 2006 og mælir einmælt býráðnum til at taka undir við upprunatilmælinum frá nevndini frá 05. september 2006 um at ganga áheitanini frá Minnisvarðanevndini á møti, og at mentamálanevndin átekur sær tað arbeiðið, sum Minnisvarðanevndin hevur havt seinastu mongu árini.

Grundin fyri at venda aftur til upprunatilmælið er, at sera trupult er at fáa fólk til at átaka sær arbeiðið í eini nýggjari Minnisvarðanevnd.

**Avgerð:**

Tilmælið frá mentamálanevndini frá 20. november 2006 varð samtykt. (8-0).

**<u>Mál nr. 74/2006.</u>**

***Viðvíkjandi leigusáttmála millum kommununa og P/F Havsbrún fyri tunnil V.***

Í sambandi við at P/F Havsbrún framhaldandi ynskir at leiga Tunnil V, so hevur kommunala umsitingin gjørt uppskot til leigusáttmála partanna millum galdandi frá 01. mei 2006.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini tann 05. desember 2006, og mælir nevndin býráðnum til at góðtaka fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála partanna millum.

Nevndin hevur á fundi tann 08. desember 2006 viðgjørt málið og mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá havnanevndini. Sambært § 1, stk. 2 hækkar árliga leigugjaldið úr kr. 180.000,00 upp í kr. 465.000,00 + meirvirðisgjald.

**Avgerð:**

Tilmælini frá havnanevndini og fíggjarnevndini vórðu samtykt. (8-0).

## Mál nr. 75/2006

***Umsókn um ískoyti til leigusáttmála fyri matr. nr. 239g Vónin/Havsbrún.***

Í sambandi við at P/F Havsbrún hevur keypt virkisbygningin hjá P/F Vónini á matr. nr. 239g á havnarøkinum, verður heitt á kommununa um ískoyti til verandi leigusáttmála, dagfestur tann 12. apríl 1983.

P/F havsbrún yvirtekur leigumálið, og treytirnar í leigusáttmálanum svara til teirra virksemi. Eisini verður biðið um, at tíðarskeiðið verður broytt frá 2008 til 2018.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini tann 05. desember 2006, og mælir nevndin býráðnum til at góðtaka ískoytið til leigusáttmálan.

Nevndin hevur somuleiðis viðgjørt málið á fundi tann 08. desember 2006, og mælir nevndin býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá havnanevndini. Hinvegin verður staðfest, at leigugjaldið pr. fermetur eftir verandi skipan lækkar úr kr. 25,00 fyri fermeturin niður í kr. 15,00. Talan er um kr. 4.400,00.

Hetta er grundað á, at virkir, sum rinda vørugjøld til Fuglafjarðar havn hava lægri leiguprís enn tey, sum einki rinda.

**Avgerð:**

Tilmælini frá havnanevndini og fíggjarnevndini vórðu samtykt. (8-0).

## Mál nr. 76/2006.

**Viðvíkjandi ásetan av fundardøgum býráðsins fyri 2007.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið skriv frá borgarstjóranum, dagfest 14. desember 2006 við uppskoti um áseting av almennu býráðsfundunum fyri árið 2007.

Skotið verður upp, at hesir verða hildnir niðanfyri standandi hóssdagar kl. 16.30 í býráðssalinum, tó við undantaki av fundinum 31. mei, sum eftir ætlan verður hildin á Hellunum og 27. september á Kambsdali:

25. januar
22. februar
29. mars
26. apríl
31. mei
28. juni
30. august
27. september
25. oktober
29. november
13. desember

**Avgerð:**

Samtykt varð at taka undir við uppskotinum frá borgarstjóranum um almennu býráðsfundirnar fyri 2007. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.20.

Jann Toftegaard

Dánjal Vang

Signar á Brúnni

Elisabeth D. Eldevig

Tórfríður Abrahamsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen